## Nógv ferð á landsvegnum

Ferðslupolitiið steðgaði ikudagin tíggju bilførarum, sum koyrdu ov skjótt. Mikudagin og mikukvøldið var politiið úti við radaranum, og fleiri bilførarar vórðu tiknir fyri at koya í skjótara lagi. Ferðmátingarnar vórðu gjørdar í Kaldbaksbotni, millum Fjarða og á Skipanesi. Samanlagt seks bilførarar fingu klipp í koyrikortið, og tað vil siga, at ferðin var meira enn 20 km um tíman meira enn loyvda ferðin. Fýra bilførarar fingu koyrikortið frádømttreytað, tí teir koyrdu meira enn 30 km skjótari enn loyvda ferð. Ein bilførari varð tikin við ferðini 90 km um tíman á Skipanesi. Tað er bygt øki, og í mesta lagi er loyvt at koyra 50 km um tíman har.





*Dollars verður nú sett upp sum leikur í Føroyum. Og tað verða óroyndir føroyingar, sum skulu røkja leiklutirnar sum Blake Carrington, Alexis og øll hini í kendu soap-operuni*

# Føroyingar kunnu gerast filmsstjørnur

**- Einasta kravið er, at tú ongantíð hevur roynt teg á palli áður, siga Marita Dalsgaard og Beinta Clothier, sum í løtuni søknast eftir føroyskum áhugasjónleikarum til Dollars**

SJÓNLEIKUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- I am a human being, I am not a machine. I am 72. I am dyslexic.

Gjøgnumbrotið kom fyrst í áttatiárunum. Sjónvarpsrøðin Dollars. Í leiklutinum sum hin ríki Blake Carrington, varð John Forsythe av álvara vælumtóktur sum sjónleikari. Og nú hevur tú møguleikan at gera honum kynstrið eftir.

Sjónleikararnir Marita Dalsgaard og Beinta Clothier eru farnar undir eina sjáldsama verkætlan, sum er óhoyrd í Føroyum. Endamálið er at geva 21 føroyingum, sum ongantíð áður hava roynt seg sum sjónleikara, møguleikan í leiklutum í sjónvarpsrøðini Dollars.

### Lýsa samfelagið

Marita Dalsgaard og Beinta Clothier fara í døgunum frá 1. til 14. august at seta upp leikir, sum vit kenna aftur úr Dollars. Umstøðurnar verða tó væl øðrvísi enn vit kenna frá sjónvarpinum. Tað verða óroyndir føroyingar, sum skulu royna seg í leiklutunum sum Blake Carrington, Krystle Carr'ton og Alexis Colby. Upptøkurnar verða í eisini í føroysku náttúruni.

Tað eru danirnir Jeppe Kristensen og Tue Biering, sum eru komnir við hugskotinum. Teir hava áður roynt tílíkar leikir, sum hava fingið frálík ummæli í Danmark.

- Nú vilja teir fegin royna hetta í Føroyum. Tue Biering ringdi til mín og spurdi, um eg var áhuga at leikstjórna. Og hóast eg nú ikki kann njóta summarfrítíðina saman við familjuni, tók eg fegin av, greiður Marita Dalsgaard frá.

Tað eru í alt sjey brot, ið skulu takast upp. Og í hvørjum broti verða ymiskir sjónleikarar.

- Nú kanst tú verða filmsstjørna í ein dag, sigur Beinta Clothier flennandi frá.

Brotini verða ikki sýnd fram alment. Tað verða áhugaleikararnir, sum gera av, hvør sleppur til ymsu sýningarnar.

### Eingin krøv

Marita Dalsgaard og Beinta Clothier saknast í hesum døgum eftir áhugaleikarum, sum skulu royna seg í leiklutunum. Og tað stendur so at siga øllum í boði at royna seg.

- Einasta kravið er, at tú ongantíð hevur roynt teg á palli áður. Og tí hava vit onga hóming av, hvat leikaratilfarið er. Ein samanseting av smædnum, framligum og skemtingarsamum føroyingar, alt í einum bólki, sum skulu framføra ein leik. Tað verður ein stór og áhugaverd avbjóðing, greiðir Marita Dalsgaard frá.

### Øðrvísi avbjóðing

Endamálið við leikunum hjá Jeppe Kristensen og Tue Biering er lýsa ymisk samfeløg. At sleppa handan leiktjøldini og finna aðrar síður av samfeløgum.

- Útlendingar greiða altíð frá, hvussu frálíkt, vakurt, vinarligt og friðarligt tað er í Føroyum. Við leikinum skulu vit vísa, hvussu føroyingurin reagerar, tá hann verður merktur av hevnd og gyrnd. Brotini verða spæld ymsastaðni í heiminum, og helst eru reaktiónirnar í Moskva og San Francisco øðrvísi enn í Klaksvík. Vit skulu flyta fordómar. Ætlanin er í mínum hugaheimi sera áhugaverd, og vit gleða okkum, greiða tær báðar frá.

*Hevur góðskan týdning?*

- Vit stíla sjálvsagt eftir tí besta. Tað eru útbúgvin fólk, sum standa fyri at klippa filmin og annað. Men tað er meira vegurin til endaliga úrslitið, sum vit síggja fram til, greiða Marita Dalsgaard og Beinta Clothier frá.

Upptøkurnar verða ymsastaðni í Føroyum. Eitt nú í Tórshavn, Eysturoynni og Klaksvík. Um tú ynskir at luttaka, kanst tú melda teg til á telefonnummar 22 86 97.